## DAGSINS MEINING

# Ein republikk og onnur!

Í eini sjónvarpssamrøðu í samband við tiltøkini í Kollafjarðardali brúkti ein løgfrøðingur orðið "banan-republikk". Uttan at viðgera hetta hugtakið við atliti til verkfallið ella tiltøkini hjá fakfeløgunum í verkfalli, kunnu vit lata hugin leita til samfelagið annars.

Hóast landsins myndugleikar vistu, at lønarsamráðingarnar fóru at verða harðar, so gjørdi landsstýrið – ella Fíggjarmálastýrið – einki munagott fyri at bera so í bandi, at føroysku løntakararnir varðveiddu reallønina. Avleiðingin er, at vit fingu stóran lønarvøkstur á almenna arbeiðsmarknaðinum, og eitt lemjandi verkfall á privata arbeiðsmarknaðinum.

Endarnir verða ikki loystir á nýggja strandfaraskipinum, Teistanum, tí Fíggjarmálastýrið og fakfeløgini hjá manningunum kunnu ikki semjast um ein nýggjan lønarsáttmála. Søgan endurtekur seg. Í einar 4-5 mánaðir lá Brimil bundin við bryggju í Noregi, tí somu partar samdust ikki um lønarspurningin. Hóast fleiri ávaraðu um, at tað sama kundi endurtaka seg við Teistanum, rætti landsstýrið ikki hond frá síðu fyri ikki at koma í somu støðu. Tá Fíggjarmálastýrið gav skarvin yvir, noyddist Løgtingið seta eina nevnd at viðgera lønartrætuna, sum ein uppmaður nú skal avgera. Í máttloysi noyddist Fíggjarmálastýrið at koyra Teistamálið fyri Fútarættin – tann danska fútarættin!

Hetta er annars samfelagsligt virksemi, sum skal virka, men tað megnar hetta landsstýrið ikki. Sama landsstýrið, sum nú krevur fullan ferðaseðlaprís frá skúla-ítróttarungdómi, so skúlaítróttardagur kundi ikki haldast í Suðuroy.

Ein annar landsstovnur – Postverk Føroya – liggur í andaleypi, tí samgongan kann ikki semjast, um stovnurin skal umskipast til eitt "almennt partafelag" ella eina "almenna landsfyritøku". Og í hesi ivastøðu kann landsstýrið heldur ikki semjast um at veita stovninum eina eykajáttan. Úrslitið er, at hóttanin at siga 40 fólkum upp er frammi hálva hvørt ár.

"Republikkin er í eygsjón", rópti ein landsstýrismaður í ovfarakæti herfyri. Sami republikanari kláraði ikki at fáa sína egnu samgongu at semjast um eina nýggja kringvarpslóg, samstundis sum hann gav Fornminnasavninum múlaband í málinum um Múrin í Kirkjubø. Spurningurin er, hvør republikk er í eygsjón?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Carl um ráðagerðina



Ingeborg Vinther og Vígdis Johannesen hava tveitt Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag út í óføri og leita í hesum døgum eftir onkrum, sum tey kunnu geva skyldina fyri sítt egna dugnaloysi.

Ingeborg vildi ikki samráðast saman við arbeiðarafeløgunum í Klaksvík og Havnar Arbeiðsmannafelag og av tí at hon ikki megnar nakað sjálv rennur Vígdis Johannesen sum ein annar hundahvølpur aftan á Ingeborg Vinther.

Sjálvt tað at hava eina lívstrygging fyri sínar limir megnar hon ikki hóast limir hennara gjalda somu sáttmálabundnu gjøld til teirra felag sum limir Havnar Arbeiðsmannafelags.

Ingeborg og Vígdis hava báðar í skrift og talu billað limum sínum inn, at teimum er bjóðað 2,5% minni í løn í semingsuppskotinum enn tað sum feløgini í Klaksvík og vit fingu. Tá tær fara so langt í sínum lygnum, má tað vera tí at tær halda sínar egnu limir vera sera lítið vitandi, annars høvdu tær neyvan roynt seg við slíkum. Í vikubløðunum royna tær eisini at billa fólki inn, hvussu einvegis nevndin í Havnar Arbeiðsmannafelag arbeiðir, men á fundi hóskvøldið 17. mai 2001, har øll nevndin var møtt, var full semja um at rætt er at lønin fyri sama arbeiði skal vera eins um alt landið.

At billa fólki inn, at eg skal hava gjørt avtaluið arbeiðsgevarafelagið og semingsstovn er so langt úti, at hetta ikki hevur nakra viðmerking uppiborna.

Til seinast, Ingeborg. Eg var ikki við, tá verkamannafylkingin fór fyri bakka, so tað ber til at klandrast uttan mína luttøku.

*Við arbeiðarakvøðu*
**Carl**

# Lumpa og lirka

**Mikkjal á Bergi**

Tey eldru okkara millum minnast uttan iva til orðafellið hjá einum sera væl kendum føroyskum politikara, sum fyri nú mongum árum síðani er farin undir grønu torvu, og sum plagdi at taka til, at politikarar, fyritøkur og myndugleikar lumpaðu og lirkaðu síni sjónarmið og áhugamál ígjøgnum.

Vit mugu tíanverri ásanna, at aftur einaferð enn endurtekur søgan seg.

Tá ið rúsdrekkalógin her á landi fyri árum síðani varð endurskoðað og broytt til at gerast lagaligari og meira nútímans, viðtók okkara háttvirda løgting at seta á stovn fría rúsdrekkasølu í kæra, lítla landi okkara, og at øll hotell og allar matstovur skuldu fáa skeinkiloyvi til sterkt øl, vín og brennivín, men var hetta treytað av, at tað *bert* skuldi skeinkjast saman við mati. Men hetta var í roynd og veru bert fyri at lumpa og lirka málið ígjøgnum, tí ikki so langa tíð aftan á varð hendan »treyt« avtikin. Tað vil við øðrum orðum siga, at øll hotell og allar matstovur nú eru vorðnar drykkjustovur. Og drykkjustovurnar verða væl vitjaðar av okkara ungdómi bæði á degi og langt út á kvøldið ella midnátt – ja, tey flokkast uttan um hesi støðini.

Tað, sum fekk meg aftur at fara at skriva um hetta álvarsmál, er, at nú um dagarnar boðaði landsstýrismaður frá, at hann var í ferð við at snikka til eitt broytingaruppskot til rúsdrekkalógina at leggja fyri løgtingið. Hetta gekk út uppá at gera lógina uppaftur meira lagaliga. Hevur nakar hoyrt so galið!!! – At gera tað uppaftur makaleysari at fáa fatur á hesum nervaeitri, sum alkohol sambært útsøgn frá læknum av sonnum er.

Nei, háttvirdi løgmaður og háttvirdu landsstýrismenn og løgtingsmenn! Steðgið heldur øllum hesum drykkjustovum ella »pubbum«, sum læra og uppvenja okkara kæra ungdóm til at njóta rúsdrekka. Úrslitini eru óhugnaliga sjónlig, og fleiri og fleiri familjur eru farnar og fara í grús av hesum eitri.

# Jákup á Borg á Torginum í SMS

TÍÐINDASKRIV

Jákup á Borg, sum flestu okkara kenna frá landsliðsfótbólti og annars fótbóltslandskappingini her heima, er í løtuni í gongd við útbúgving innan handilsyrkið. Hann lærir hjá Thomas Dam Ítrótti. Í samband við útbúgving sína sum krambakallur innan ítróttaryrki, skal Jákup undir høvuðsuppgávu sína í næstum. Í hesum samband kemur Jákup at verða á Torginum í SMS týsdagin og mikudagin 22. og 23. mai. Á sølframsýningin fer Jákup at leggja dent á at selja fótbóltsskógvar. Tí fer hann at seta upp ein sølubás við fótbóltsskóm frá Adidas, Nike og Puma. Afturat sølubásinum fer Jákup at seta eitt fótbóltsmál upp á Torginum, har møguleiki er at skjóta á mál. Alt eftir, hvussu mong skot tú fært í málið, gevi eg avsláttur, um skógvar verða keyptir á Torginum, sigur Jákup. Øll kunnu luttaka í hesum tiltakinum. Týsdagin kl. 15 fara John Petersen og Tróndur at skriva autografar á Torginum, og møguleiki verður eisini at skjóta á mál hjá Tróndi. Fríggja- og leygardagin er nýggja telefonfelagið, Tele F, á Torginum, har tey m.a. vísa fram, hvørjar tænastur teir veita. Hósdagin er SMS stongt, tó hevur Hornið opið frá kl. 14.00-23.00.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Strejken – hasard med ILA

**Peter Østergård,**
*Dyrlæge*
*Hoyvík 21.05.01*

Skal en strejke have effekt må den naturligvis ramme hårdt og kontant, og allerhelst ramme de parter som er en betydende del af konflikten.

Når man blandt andet vælger opdrætsnæringen som målgruppe er det en handling som netop kan træffe generelt hårdt og kontant i nationaløkonomien, og samtidig meget hårdt på én erhvervsgren.

Men — når man så vælger ikke at tage hensyn til at to af anlæggene er hårdt ramt af ILA med en betydelig dødelighed til følge, så er man i den grad gået for langt.

På de to berørte fjorde står en biomasse på over 5.000 tons af laks og det siger sig selv at en løbsk udvikling af sygdommen og smitten vil kunne få katastrofale følger, ikke bare lokalt i de to fjorde, men sandelig også for hele opdrætserhvervet.

For at mindske risikoen for spredning af ILA-sygdommen til andre områder, har landsdyrlægen iværksat smitteforebyggende tiltag i de berørte anlæg.

Der er, som det væsentligste, givet påbud om udslagtning af enheder med klinisk syg fisk og forøget dødelighed, samt strenge påbud om en forsvarlig håndtering og destruktion af dødfisken fra anlæggene og slagteaffald fra slagtningen af den syge fisk.

Disse tiltag er nu blevet blokeret af strejken, og jeg ser med meget stor alvor på den stærkt øgede risiko for smittespredning, som kan opstå i den forbindelse.

Det er værd at bemærke sig at strejken hindrer de normale rutiner for opsamling af dødfisk, udtynding af fisken, udskiftning af begroede noter samt fodringen af fisken — alt sammen faktorer som virker stressende på fisken.

For ILA-smittede fisk er situationen den, at enhver form for stress kan være den udløsende faktor for et alvorligt udbrud af sygdommen.

Ændringerne i daglige rutiner som følge af, at der ikke længere er mandskab til at udføre dem, og i særdeleshed svigt i fodringen, vil af fisken opleves som stress — og kan altså være årsagen til et kraftigt sygdomsudbrud, med massiv dødelighed til følge.

Når vi så i tillæg befinder os på et tidspunkt af året, hvor der erfaringsmæssigt er størst problemer med ILA, gør det bare hele situationen endnu værre.

Den dødelighed som kan opstå som følge af dette, er mere end vanskelig at håndtere, selv i en situation, hvor man har alle tilgængelige hjælpemidler til rådighed.

Konsekvenserne af at de to anlæg må arbejde med en kraftig reduktion i bemandingen, samtidig som det ikke er muligt at udslagte enheder med forøget dødelighed, kan faktisk blive helt uoverskuelige og vise sig som en national katastrofe.

Jeg vil derfor opfordre de involverede parter i strejken til straks at sørge for at alle nødvendige smitteforebyggende tiltag i de to anlæg kan genoptages for fuld styrke, og dette inkluderer:

- at anlæggene må kunne opsamle dødfisken og føre den til destruktion på betryggende måde
- at anlæggene kan fodre fisken på normal måde
- at alle almindelige arbejdsoperationer kan foregå uhindret
- at pålagte udslagtninger af fisk øjeblikkeligt genoptages på slagteriet i Oyndarfjørður

At tro man kan få en time-out i kampen mod ILA er i mine øjne at spille hasard og ganske naivt, og ikke noget som ansvarlige fagforeningsledere, arbejdsgivere og politikere bør give sig af med i det hele taget!



*ILA herjar ótálmað á Funningsfirði*

# Triple Trio í Ebenezer gevur fløgu út

TÍÐINDASKRIV

Eftir at tær hava sungið saman ið tólv ár, gevur Triple Trio í Ebenezer í hesum døgum út fløgu við átjan sangum, sum allir verða sungnir á føroyskum.

Tey munnu vera mong, sum komast við tær, hóast navnið ikki liggur so raðið á føroysku tunguni. Tað er Triple Trio í Ebenezer, sum vit tosa um. Heitið kom mest sum av sær sjálvum. Níggju kvinnur fóru í síni tíð at syngja tíraddaðan sang saman. Tær hildu á, og so vórðu tær nevndar Triple Trio.

Hesar kvinnurnar hava allar nógvar royndir sum sangarar í sangkóri og smærri bólkum. Tað eru tólv ár síðani, at tær fyrstu ferð sungu saman sum Triple Trio. Onkrar útskiftingar hava verið, men teir flestu sangararnir eru tær somu sum fyri tólv árum síðani.

Í hesi vikuni verður fyrsta fløgan hjá Triple Trio at fáa. Heitið á henni er Lyftislandið, sum er navnið á einum av sangunum. Fløgan er júst komin til Føroya og hon skuldi verið at fingið kring landið í hesi vikuni.

Fløgan kemur út upp undir ferðina til Onglands, sum Triple Trio og Dupultkvartettin í Ebenezer fara á seinni í hesi vikuni. Tey fara av stað hósdagin, og tey koma aftur mánadagin. Triðja árið á rað skulu tey syngja á evangelisk-ari stevnu í Whitby.

Á ferðunum uttanlands hevur ofta verið spurt eftir útgávum hjá Triple Trio. Hetta er ein av orsøkunum til, at tær fyri einum góðum ári síðani fóru at taka upp. Einki er at liggja omaná, at mongum heima á landi dámar væl at hoyra hesar kvinnurnar syngja. Tær hava støðugt tikið lut á fundum samkomum í Ebenezer og aðra staðni kring landið, og tær hava mangan lívgað við serlig høvi. Og Triple Trio hevur verið at hoyrt í Útvarpinum og í Sjónvarpinum.

Nú verður høvi at hoyra tær, tá lurtararnir sjálvir hava tíð og umstøður at lurta. Av teimum 18 sangunum á nýggju fløguni eru fleiri heilt kendir. vit kunnu t.d. nevna Sæl er mín sál, Í urtagarð Hans komi eg, Er tín dagur fyltur av sorg og Kvølfulla stund.

Á fløguni hjá Triple Trio eru ellivu sangarar: Brita á Váli Smith, Charlotta á Váli Olsen, Anna D. Háberg, Poula Sørensen, Jóhanna Rasmussen, Ragnfríð Guttesen, Jóna Rasmussen, Gunrið Simonsen, Elisabeth Guttesen, Beinta Háberg Jacobsen og Alma Olsen.

Tónleikararnir eru kendir frá øðrum útgávum og luttøku á fundum og samkomum.

ReproZ hevur lagt húsan til rættis, og tað er Evangeliska Røddin, sum hevur givið fløguna út.

# Arbeiðsgevarar tikið Suðuroynna sum gísla

**Føroya Arbeiðarafelag**
**Havnar Arbeiðskvinnufelag**

Vøra slapp ikki úr pakkhúsinum á bryggjuni í Havn, tí Arbeiðsgevarafelagið noktaði. Sostatt eiga arbeiðsgevarar skuldina av, at neyðsynjarvøra ikki er farin suður, hóast arbeiðarafeløgini hava víst góðan vilja.

At arbeiðsgevararnir nú hava lagt seg útí tiltøkini, meta feløgini í verkfalli, sum at arbeiðsgevararnir nú vilja stýra tiltøkunum og royna at øsa fólk.

.....

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag meta nú, at Arbeiðsgevararnir - Føroya Arbeiðsgevarafelag - hevur tikið Suðuroynna sum gísla.

Orsøkin er, at arbeiðsgevararnir nú forða limum sínum at flyta vøru til Suðuroynna.

Tá verkfallið var veruleiki, settu arbeiðarafeløgini í verkfalli blokadutiltøk av vøruflutningi í verk.

Síðani legði løgreglan uppí og gav boð um, at blokadan í Kollafirði skuldi halda uppat. Síðani kom ójavni í og bert Suðuroyggin og Sandoyggin vóru raktar av blokadu og neyðsynjarvøra gekk undan í hesum útjaðaraøkjum, meðan alt gekk sína vanligu gongd aðrastaðni. Mett var, at rætt er ikki, at eitt nú Suðuroyggin — og Sandoyggin - eru fyri vanbýti í mun til aðrar partar av landinum.

Fyri at vísa góðan vilja avgjørdu arbeiðarafeløgini í verkfalli, at eingin orsøk var, at ávís øki vóru harðari rakt, enn onnur.

Avtalað varð við feløgini í Suðuroynni, at neyðsynjarvøra skuldi sleppa suður. Ein heilsøla, P/F Poul Hansen, hevur heilsøludeild á Tvøroyri og skuldu deildin fáa vøru. Hetta skuldi henda undir skipaðum viðurskiftum.

**Arbeiðsgevarar nokta**
Best, sum alt var avtalað, og gekk sína gongd mánadagin, komu harraboð.

Arbeiðsgevarafelagið noktaði limum sínum, Poul Hansen, at flyta vøru til Suðuroyar mánakvøldið 21/5-2001.

Vøran slapp ikki úr pakkhúsinum á bryggjuni í Havn, tí Arbeiðsgevarafelagið noktaði. Sostatt eiga arbeiðsgevarar skuldina av, at neyðsynjarvøra ikki er farin suður, hóast arbeiðarafeløgini hava víst góðan vilja.

At arbeiðsgevararnir nú hava lagt seg útí tiltøkini, meta feløgini í verkfalli, sum at arbeiðsgevararnir nú vilja stýra tiltøkunum.

**Øsing**
Arbeiðarafeløgini meta støðuna, sum at tey fyrst vórðu trýst út í verkfall og at arbeiðsgevararnir nú vilja stýra tiltøkunum. Í farnu viku fingu arbeiðsgevararnir hjálp frá løgregluni at fullføra henda setning.

At arbeiðsgevararnir nú nokta vøru at koma í ávísar partar av landinum er óivað liður í at øsa fólk og at venda tey ímóti arbeiðarafeløgunum í verkfalli, men hetta er einki annað enn uppílegging frá arbeiðsgevarunum, meta Føroya Arbeiðarafelag/Havnar Arbeiðskvinnufelag, sum hóast góðan vilja og neyva tilrættalegging í evstu stund ikki fingu neyðsynjarvøru suður við Smyrli mánakvøldið. Bert orsakað av uppílegging arbeiðsgevaranna.